Ringur dagur hjá KÍF

H71 vann vi› trimum málum á KÍF í Vestmanna. Hoyvíkingar vóru frammanfyri allan dystin, og teir kunnu blanda seg í hei›ursmerkjastrí›i›, um ta› gongur væl

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

KÍF-H71 24-27 (12-15)

- Hetta var ein ringur dagur hjá okkum, har einki rigga›i, sum ta› skuldi. Vit brendu heilt einfalt alt ov nógvar gó›ar møguleikar, sigur Petur Martin Poulsen hjá KÍF.

H71 leg›i seg nøkur mál framum heilt frá byrjan, og sjálvt um kollfir›ingar bardu seg innaftur í dystin ta einu løtuna, eydna›ist ta› ikki at koma aftur íaftur frá vánaligu byrjanini.

- Ta› var byrjanin, sum oy›ileg›i alt fyri okkum, tá vit duttu ov langt afturum H71.

Petur Martin metir ikki, at javnleikurin móti Kyndli bara var hepni, og hann heldur, at teir kunnu finna ta› spæli› framaftur, tí teir hava fólki› til betri úrslit enn ta› móti H71.

- Vit høvdu ikki tamarhaldi› allatí›ina, tí KÍF minka›u einafer› ni›ur í eitt mál, men annars var ta› ein uppiborin sigur hjá okkum, sigur Anfinn N. Debess hjá H71.

- Ta› er naka› tí›liga at fara at tosa um hei›ursmerki, men vit fara sjálvandi at gera alt fyri at náa hesum máli. Ta› skal ganga rættiliga væl, um ta› skal eydnast, tí bæ›i Neistin og Kyndil hava sterk li›, men vit hava ein møguleika fyri hesum, sigur Anfinn.

H71 er eftir sigurin á sama stigatali sum Neistin og tvey stig frammanfyri Kyndil.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
KÍF: Petur Martin Johansen 6, Dorica Tomic 5(3), Eddie Joensen 4, Petur Martin Poulsen 3, Sune Davidsen 2, Vagnur Johannesen 2, Jákup Dam 2
H71: Halgir Dahl Olesen 9, Johnny Djurhuus 5, Anfinn N. Debess 5, Stefan Daforfte 4(2), Rene Dahl Olesen 2, Rolf Mouritsen 1, Olaf Vestergaard 1
Brotskøst: KÍF 3, H71 2
Útvísingar: KÍF 4
Dómarar úr Tjaldur: Dánjal Hansen og Kári Hansen



Annfinn N. Debes heldur, at ta› enn er naka› tí›liga at droyma um hei›ursmerki hjá hoyvíkingum

Johan er á beinkinum

OB sendi troyttu vibergensarnar til hús vi› 2–1 tapi í vi›førinum

Einasta danska felagi›, sum framvegis hevur ein veruligan møguleika at halda fram í Europa Cup, tá seinnu dystirnir í næsta umfarinum ver›a spældir hóskvøldi› í komandi viku, er Viborg. Teir taptu hóskvøldi› 1–0 í Spania ímóti Rayo Vallecano, og ta› tapi› halda teir seg hava møguleika at vinna aftur.

Men sunnudagin tóktist ta›, sum um teir bøttu fyri fer›ina til Spania. Venjarin vildi ikki hoyra talan um, at hansara li› ikki var nóg væl fyri kropsliga til at spæla hósdag og sunnudag, men bæ›i hann og spælararnir ásanna›u eftir 2–1 tapi› í Odense, at ta› tóktist sum um sinniliga yvirskoti› ikki var nóg stórt sunnudagin.

Føroski landsli›sspælarin, Johan B. Hansen, hev›i í fleiri vikur eftir summarste›gin fast pláss í høgra verjubor›i hjá OB, men nú hevur hann – fyribils í hvussu so er – mist møguleikan. Johan var á beinkinum frá fyrsta bríksli sunnudagin, og har var hann sitandi allar 90 minuttirnar.

4.562 ásko›arar sóu Mwape Miti leggja OB framum í 19. minutti. Viborg venjarin var so miki› illa nøgdur vi› avriki› hjá sínum monnum í 1. hálvleiki, at hann eftir ste›gin setti tríggjar ómó›ar spælarar á vøllin.

Bara seks minuttir eftir ste›gin gav ta› úrslit, tá ein av n‡ggju monnunum, Klaus Kærgård, skora›i. Talan var um nógvar skeivar sendingar, men ta› løgdu teir í OB vertin á, tá dómarin hev›i bríksla› fyri sí›stu fer›. Teir høvdu vunni› 2–1. Sigursmáli› skora›i gamli li›felagin hjá Toda Jónsson í FCK, Carsten Hemmingsen, tá hann úr 35 metrum heilflukta›i flatt í Viborg máli›.

jh

Álvur skal venja kvinnulandsli›i›

Kvinnurnar skulu taka lut á oyggjaleikunum, sum vera á Isle of Man í juli komandi ár, og venjarin heldur, at avbjó›ingin sær spennandi út

Nú er ta› greitt, at ta› ver›ur Álvur Hansen, sum komandi ár fer at hava ábyrgdina fyri kvinnulandsli›num í fótbólti. Álvur man vera tann venjarin, i› sum heild hevur størst innlit í kvinnufótbóltin í Føroyum. Hesi seinastu árini hevur hann havt ábyrgdina av U–18 kvinnulandsli›num. Hann hevur eisini vant gentuli› á Skála og í Gøtu, og frammanundan hevur hann veri› venjari í 1. deild í kvinnufótbólti bæ›i í Fuglafir›i og á Skála.

Stóra avbjó›ingin hjá kvinnulandsli›num ver›ur fótbóltskappingin á oyggjaleikunum. FSF hevur fyrr í ár bo›a› frá, at ætlanin er at taka lut í kappingini, sum ver›ur á Isle of Man fyrst í juli komandi ár.

Einki kvinnulandsli› hevur veri› sí›ani í 1995 og í 1996. Tá tók li›i› lut í EM undankapping. Páll Gu›laugsson var venjari, og Álvur Hansen var hjálparvenjari.

Sí›ani tá hevur U-18 kvinnulandsli›i› á hvørjum ári tiki› lut í EM undankappingum.

Fyrireikingarnar alt at siga

Álvur Hansen heldur, at uppgávan at fyrireika kvinnulandsli›i› til oyggjaleikirnar komandi ár, er ein spennandi avbjó›ing, og hann sær ikki so svart upp á ta›:

– Eg haldi, at ta› eru nógvir gó›ir spælarar at velja ímillum. Onkrir spælarar gera seg galdandi á høgum stø›i í Danmark, og í heimligu kappingini eru nógvar av teimum, sum hesi seinastu árini hava veri› á U–18 landsli›num, profilar. Hvussu væl li›i› ver›ur fyri veldst um, hvussu nógv orka ver›ur løgd í venjingina, vísir Álvur Hansen á.

Landsli›svenjarin og Fótbóltssambandi› arbei›a vi› ætlanum um, at spælararnir skulu fara undir venjingarnar so tí›liga á árinum, sum ta› ber til.

– Ta› hevur sera stóran t‡dning fyri venjingarstø›una komandi summar, at ste›gurin í veteur ikki ver›ur ov langur. Hvussu vit leggja til rættis, er ta› ov tí›liga at siga naka› um akkurát nú, men eg hev›i ikki tiki› uppgávuna upp á meg, um eg ikki rokna›i hetta sum ein gó›an møguleika hjá kvinnunum at standa seg í oyggjaleikahøpi. Um kvinnurnar fara at leggja ta› í, sum skal til, so ivist eg ikki í, at ta› eisini fer at síggjast aftur í landskappingini í Føroyum, heldur Álvur Hansen.

jh

HM dystur

Kramnik eitt stig frá heimsmeistaraheitinum

Vladimir Kramnik hevur økt um leiðsluna í HM dystinum ímóti núverandi heimsmeistaranum Gary Kasparov. Støðan er 7,5 - 5,5 til avbjóðaran Kramnik nú trý talv eru eftir av dystinum

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Kasparov líkist als ikki sær sjálvum í HM dystinum ímóti Kramnik. Hann hevur enn ikki vunnið eitt talv, og vísir einki við hvíta fólkinum. Hann er stutt sagt útlúgvaður, og líkist enn meira einum heimsmeistara, ið er við at missa trúnna.

Trettan talv eru telvað, sekstan skulu telvast og fyri at Kasparov skal endurvinna heitið má hann ogna sær minst hálvtriðja stig í hesum seinastu trimum talvunum, tí 8-8 er nokk hjá Kasparov at vinna dystin. Hann hevur einki prógvað, og fáir millum talvkønir trúgva at hann kann venda dystinum.

Kasparov troyttur

Sunnudagin telvaðu teir trettanda talvið, og eftir bert fjúrtan leikum bjóðaði Kasparov við hvíta fólkinum Kramnik javnleik, sum hesin sjálvsagt varð fegin um. Kasparov segði eftir talvið, at hann kendi seg troyttan. Hetta eru orð sum Kasparov aldrin hevur brúkt í sambandi við ein HM dyst, og tí eru tey skelkandi. Tað tykist sum Kasparov hevur givið upp, og betri gerst tað ikki at hann hevur tvey talv við svørtum eftir at leika og bert eitt talv við hvítum. Men í roynd og veru er tað við svørtum at Kasparov hevur havt ávísar møguleikar, men telvar Kramnik sum hann hevur megnað higartil, er neyvan nakar gjøgnumvegur hjá Kasparov.

Kramnik hevur sjálvsagt telvað sum ein brandur. Hann hevur megnað at ogna sær fyrimun í byrjanarspælinum, og besta dømi um tað er tíggjunda talvi, har hann vann eftir bert 25 leikum, og tað hevur eingin megnað ímóti Kasparov síðani hann bleiv heimsmeistari fyri fimtan árum síðani. Hetta talv og tað trettanda er við í blaðnum í dag.

Fjúrtanda talv verður telvað í dag, meðan tað næstseinasta- og seinasta talvið verða ávíkavist telvað hósdagin og leygardagin. Vinnarin – og sostatt heimsmeistari – fær umleið fimtan milliónir, meðan taparin fær fimm milliónir.

Talvini hesa vikuna

Kramnik,V (2770) - Kasparov,G (2849)
Braingames WCC London ENG (10), 24.10.2000

1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.Nc3 Bb4 4.e3 0-0 5.Bd3 d5 6.Nf3 c5 7.0-0 cxd4 8.exd4 dxc4 9.Bxc4 b6 10.Bg5 Bb7 11.Re1 Nbd7 12.Rc1 Rc8 13.Qb3 Be7 14.Bxf6 Nxf6 15.Bxe6 fxe6 16.Qxe6+ Kh8 17.Qxe7 Bxf3 18.gxf3 Qxd4 19.Nb5 Qxb2 20.Rxc8 Rxc8 21.Nd6 Rb8 22.Nf7+ Kg8 23.Qe6 Rf8 24.Nd8+ Kh8 25.Qe7 1-0

Kasparov,G (2849) - Kramnik,V (2770)
Braingames WCC London ENG (13), 29.10.2000

1.e4 e5 2.Nf3 Nc6 3.Bb5 Nf6 4.0-0 Nxe4 5.d4 Nd6 6.Bxc6 dxc6 7.dxe5 Nf5 8.Qxd8+ Kxd8 9.Nc3 h6 10.h3 Ke8 11.Ne4 c5 12.c3 b6 13.Re1 Be6 14.g4 remis

3rd Tórshavn International

Telving skal vera fólkaítrótt

Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri, segði í røðuni, ið hann helt á samkomuni, sum Talvsambandið hevði fyri luttakarunum í altjóða talvkappingini fyri góðum tveimum vikum síðani, at hann droymir um, at talvið skal fáa innivist í fólkaskúlanum. Vit prenta røðuna, sum eisini inniber hugleiðingar úr altjóða talvheiminum



Tórbjørn Jacobsen, mentamálaráðharri

Tað er hugaligt at vera mentamálaráðharri í einum landi, sum er í menning á øllum økjum – tað veri seg politiskt, vinnuliga og ikki minst á mentanarøkinum.

Eri ongin telvari, men dugi mannagongdina. Ella tað sum í talvsjargongini verður rópt skipstalv. Teoriin kom ongantíð til sættis, men harfyri hava løturnar við talvborðið verið eitt einastandandi upplivilsi hvørja ferð. Líkamikið um tað endaði í gleði ella sorg.

Talvborðið hevur altíð fasinerað meg. Hetta fullkomna konseptið, sum ongin kann gera nakað við ella broyta. Og telvarin. Í djúpum tonkum. Totalkonsentreraður. Heilakyknurnar fúka í ymsar ættir. Besettar av viljanum at vinna á mótstøðumanninum. Ella kanska meiri av ikki at lúta fyri honum. Tapið. Hendan afturvendandi tragedian. Mínir tankar eru hjá tykkum, ið ikki komu uppá sigursskammulin hesaferð. Tí eisini eg hati at tapa. Hetta er menniskja, og driftin, sum ber mannaættina víðari fram á leið.

Talvið hevur stóran áhuga í hesum landinum. Vit, sum eru á mínum aldri, minnast dystin í Reykjavík millum Bobby Fischer og Boris Spaski sum ein katalysator, ið broytti talvheimin. Raffineraði brúkarin av miðlunum, amerikanska talvflogvitið, ein ekstremur serlingur, breyt hitt sovjetiska monopolið. Alt kann henda á talvborðinum. Heimurin kókaði. Og spælið fór enn einaferð sína sigursgongd kring allan heimin.

Tað er ein kongstanki hjá føroyska mentamálaráðharranum at gera talvið til eina fólkaítrótt. Hetta letur seg bara gera, um spælið fær innivist í fólkaskúlanum, sum skuldi verið so upplagt, tá ið tú ígjøgnum hendan heilafimleikin lærir at konsentrera teg maksimalt yvir eitt longri tíðarskeið enn vanligt er, og so hetta, at hyggja fleiri leikir fram í tíðina. Ein dygd sum øllum tørvar.

Sum so mong onnur áhugaverd fyribrigdi, hevur talvið eisini elvt til mytur og mystiskar søgur. Kendi rithøvundurin Edgar Allan Poe segði, at tann telvarin, ið best legði til merkis, hevði munin. Winston Churchill segði, at tað finnast telvarar, ið gerast so uppøstir, at teir fáa hjartaslag og doyggja, og hann legði afturat, at tað hava teir gott av. Tá ið fransmaðurin Jean-Jacques Rosseau av fyrstan tíð upplivdi talvið, stongdi hann seg inni í tríggjar mánaðir, og gjørdi einki annað enn at telva. Og tá ið legendan yvir øllum, Aljechin, heimsmeistari ígjøgnum nógv ár, suverenur í tíðarskeiðnum frá 1927-1945, tapti á fyrsta sinni aftur, fór hann upp á hotelkamar sítt, telvaði leikin ígjøgnum einaferð afturat, og síðani dró hann revolvaran fram, trekti hanan og skeyt seg sjálvan. Sum tit vita hendi hetta í Lissabon og seinri vórðu jarðisku leivdirnar fluttar til París. (Eftir at henda røðan varð hildin, kom fram, at tað eru fleiri mytir um deyðan hjá Aljechin. Onkur sigur, at hann doyði av blóðtøppi ella heilabløðing).

Á borðinum hjá føroyska mentamálaráðharranum stendur eitt talvborð. Fólkið er sett. Bíðar eftir heimsins besta telvara, Gari Kasparov, sum vónandi ger innrás í oyggjunum um eitt ár. Mr. Nolsøe hevur lovað mær, at fyrsta talvið verður leika ímóti ráðharranum, í stjórnarbygninginum. Men eg ætli mær ikki at gera sum Aljechin, um eg tapi. Til tess er ov stórur munur á ratingtalinum. Tit skula heldur ikki handla sum hin legendariski russarin, sjálvt um tit taptu hesaferð, tað liggja nógvar sigrar og bíða eftir tykkum úti í framtíðini.

Tøkk fyri at tit komu til 3rd Tórshavn International. Tøkk fyri tann stimbur tit hava veitt føroyskum telvarum í hesi kappingini. Og havi eina góða ferð heimaftur til Ruslands, Ukreina, Aserbadjan, Íslands, Írlands, Noregi, Ísrael, Danmørk, Sviaríki, Finnlands og Onglands.